# Til fiskiskap um tvær vikur

*Nógv fólk var samankomið, tá tað sjáldsama hendi, at tveir nýbygningar vórðu lætnir sama dag*



**Tað er ikki á hvørjum degi at ein føroyskur nýbygningur verður latin eigarum sínum. Og tað er ikki hent áður, at tveir nýbygningar verða lætnir sama dag**

SKIPASMÍÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Havn:** Stórur dagur var á Tórshavnar Skipasmiðju mánadagin, tá eigararnir av tveimum nýbygningum tóku ímóti bátum sínum.

Talan er um Hansa Mariu av Toftum og Skálafoss úr Vestmanna, sum nú fara at rigga til at fara á sínar fyrstu túrar á landleiðini.

Av Skálafossi verður sagt, at teir ætla sær á fyrsta túrin um einar tvær vikur, og Hansa Maria fer á sín fyrsta túr beint eftir hetta.

Á samkomuni á Vestaru bryggju takkaði stjórin á skipasmiðjuni, Gunnar Mohr, øllum starvsfólkunum fyri tað ídni og tann eldhugan, sum tey høvdu lagt í at gera bátarnar lidnar.

Tað er jú ikki á hvørjum degi, at nýbygningar verða lætnir føroyskum eigarum. Og so er hetta eisini fyrsta ferðin at tveir bátar verða lætnir eigarum sínum samstundis.

Báðir trolararnir eru eins stórir – 19 metrar langir og slakar seks metrar breiðir. Skrokkarnir eru smíðaðir í Polen, men vórðu í heyst sleipaðir á Havnina, har teir síðani eru gjørdir lidnir.

## Gott fólk

Nógv fólk úr Vestmanna og av Toftum var samankomið við skipasmiðjuna hesa løtuna.

Veðrið var av tí fagrasta og allastaðni sást Merkið veittra, tí tað var jú eisini Flaggdagur.

Á bryggjuni setti Havnar Hornorkestur sín serliga dám á handanina, sum var eitt slag av upphiting til tað stóra tiltakið í samband við Flaggdagin á Vaglinum.

Gunnar Mohr, stjóri á skipasmiðjuni helt síðani takkarrøðu sína, har hann vísti á at hann hevði nógvum góðum fólki at takka fyri nógv og gott arbeiði við báðum nýbygningunum.

Hann vildi tó ikki nevna nøkur nøvn, men ynskti kortini at takka verkfrøðingi teirra, Thormundi Johannesen, sum hevði verið við heilt frá byrjan av.

## Vanta ordrar

– Thormund hevur gjørt eitt ómetaliga stórt arbeiði: Frá at hava eitt reint pappír framman fyri sær og síðani til tær tekningarnar, sum í dag síggjast aftur í hesum báðum trolarunum, segði hann.

Tað er ikki á hvørjum degi, at skipasmiðjan fær ordrar um nýbygningar. Og hetta merkist eisini aftur á skipasmiðjuni.

– Uttan nýbygningar verður truplari hjá okkum at varðveita førleikan at skapa og at byggja skip.

– Men vit arbeiða alla tíðina við at finna fáa nýggjar ordrar til vega, segði Gunnar Mohr.

Eftir at trolararnir báðir vóru navngivnir varð boðið til eina hugnaliga samveru, og síðani ein royndartúr fyri innbodnum.

Um kvøldið varð eisini nógv gjørt burturúr í Vestmanna og á Toftum, tá nýggjastu fiskiførini í flotanum komu til heimbygdir sínar.



*Reiðarin á Skálafossi fegnast um nýggja trolaran, sum fer til fiskiskap um tvær vikur*



*Gunnar Mohr kann vera fegin, men hann vildi ynskt sær, at fleiri ordrar koma um nýbygningar*